## Skulu lesa meiri

Í framtíðini skal føroyski fólkaskúlin leggja størri dent á at læra børnini at lesa, og tí skulu tey lesa minst 20 minuttir um dagin. Tað er eitt av átøkunum, sum landsstýrismaðurin í skúlamálum ætlar at seta í verk fyri at bøta um tað vánaliga úrslitið í PISA-undankanningini. Samstundis skal Læraraskúlin leggja størri dent á lesing, og næmingarnir skulu hava atgongd til skúlabókasøvn ta tíðina, teir eru í skúlanum.

## Býráð broytir reglugerð

Tórshavnar býráð ætlar sær nú at broyta reglugerðina fyri, hvussu grundstykki skulu lutast. Orsøkin er, at fleiri hava verið stak ónøgd við, at umsøkjarar til grundstykki, íbúð og randarhús standa á sama lista. Hendan reglan kom í gildi fyri einum ári síðani, men nú sigur borgarstjórin, Heðin Mortensen, at hann fer at mæla býráðnum til at broyta reglugerðina, soleiðis at umsøkjarar til grundstykki og randarhús standa á hvør sínum lista.

# Samansjóða skúlan í Gøtu og í Leirvík

**Bygdaráðini í Leirvík og í Gøtu hava sett eina nevnd at kanna eftir, hvussu skúlarnir í Gøtu og í Leirvík kunnu samansjóðast til eina eind. Tað hevur eisini verið nevnt at bygdirnar skuldu royna at fáa sína egnu framhaldsdeild**

KOMMUNU-SAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo



*Hóast Leirvík og Gøta ikki leggja saman fyrrenn um tvey ár, eru kommunurnar longu farnar undir fyrireikingarnar*

Nú skulu skúlarnir í Leirvík og í Gøtu samansjóðast til eina eind.

Tað ætla tey bæði bygdaráðini.

Gøta og Leirvík leggja saman til eina kommunu tann 1 januar 2009.

Men hóast samanleggingin formliga er tvey ár burtur, hava kommunurnar gjørt ein sáttmála, sum er ein forleypari til sjálva samanleggingina.

Hesin sáttmáli kom í gildi fyrsta januar í ár. Og tey lógu ikki á boðunum, tí tey hava longu sett nevndir at fyrireika ymsar tættir í samstarvinum ímillum tær báðar bygdirnar.

– Í sambandi við samanleggingina, hava vit sett okkum fyri at fáa skúlarnar í Gøtu og í Leirvík samansjóðaðar so at teir virka sum ein eind, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík.

Til at fyrireika hetta hava bygdaráðini í Gøtu og í Leirvík sett eina nevnd, sum skal kanna eftir, hvussu skúlarnir kunnu fáast at virka sum eina eind. Og tað skal í seinasta lagi vera tá ið kommunurnar leggja saman.

Tað eru partarnir, sum varða av skúlanum, ið eru umboðaðir í nevndini. Sostatt er umboð fyri bygdaráðini, skúlastýrini og lærararnir við í nevndini.

Borgarstjórin í Leirvík ásannar, at tað eru nógvir snávingarsteinar á leiðini fram til ein sameindan skúla.

Sjálv hevur hon onki boð upp á, at hvat hetta kann enda við, tí nú skal arbeiðsbólkurin lýsa málið og teir møguleikarnir, sum eru.

– Endamálið hjá okkum er at fáa meiri burturúr báðum skúlunum. Men, hvussu tað kann gerast, skal bólkurin gera eitt tilmæli um.

### Hava nevnt framhaldsdeild

Men Fríðgerð Heinesen staðfestir eisini, at endamálið er at taka alla skúlagongdina frá 1. til 10, flokk við í arbeiðið hjá nevndini.

Men hon sigur eisini, at eitt, sum er nevnt, er, at samanlagda kommunan skal royna at fáa sína egnu framhaldsdeild, í hvussu so er 8. og 9. flokk.

Eisini hetta er ein spurningur, sum nevndin fer at hava við í sínum arbeiði.

Men úrslitið kann eisini verða, at lítlar og ongar broytingar verða.

Sum er, ganga børnini í Gøtu og í Leirvík í framhaldsdeild í Fuglafirði og skal skúlaskapurin í Gøtu og Leirvík endurskoðast, kann tað eisini ávirka støðuna í Fuglafirði, serliga vissi tað vísir seg, at málið verður at fáa framhaldsdeild, tí so verða børnini tikin úr framhaldsdeildini í Fuglafirði.

Av tí sama hava bygdaráðini í Gøtu og Leirvík kunna fuglfirðingar um ætlanina fyri ikki at dylja nakað fyri fuglfirðingum.

Fríðgerð Heinesen vísir annars á, at nógv hevur verið tosað um at skipa skúlan øðrvísi, eitt nú við felags 10. flokki fyri alla Eysturoy og kanska Klaksvík við.

– Hetta eru spurningar, sum vit ikki vísa frá okkum, men tað vísir seg, at tað verður ikki til meiri enn prát, leggur hon afturat.

### Brunaliðini leggjast saman

Kommunurnar í Gøtu og Leirvík hava eisini sett nevnd at samansjóða brunaliðini.

Í hesum sambandi er setningurin greiðari enn við skúlanum.

– Vit hava sett okkum fyri at leggja brunaliðini saman sum skjótast. Spurningurin er so, hvussu tað verður skipað. Í hesum sambandi veldst eisini um, hvørjikrøvmyndugleikarnir seta, sigur Fríðgerð Heinesen.

# Nýtt tilboð til tilkomnar leirvíkingar



*Leirvíkingar fáa nú ein bústaðarmøguleika afturat*

**Leirvíkar Kommuna fer nú at byggja lutaíbúðir fyri at geva leirvíkingum ein valmøguleika afturat**

BÚSTAÐIR

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

Bygdaráðið í Leirvík fer nú at byggja lutaíbúðir í bygdini.

Tað hevur bygdaráðið nú samtykt.

Talan er um fimm lutaíbúðir, sum skulu byggjast við Ranggil, beint eystanfyri eldrasambýlið, Giljagarð.

Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík, sigur, at ætlanin er at byggja lutaíbúðirnar sum fimm samanbygd hús, sum hvørt verður 50-70 fermetrar til støddar.

Hon sigur, at tey, sum keypa húsini, keypa so hvør sín lut í ognini. Talan er sostatt ikki um at leiga, men keypararnir fara sostatt at eiga hvør sín lut.

Enn er óvist, hvussu nógv húsini fara at kosta. Men ætlanin er, at lutaeigararnir gjalda eina upphædd fyri sín lut fíggja restina við láni, sum teir gjalda. Harafturat koma felags útreiðslur og gjald fyri hita og el, sum verða eftir nýtslu fyri hvørt húsið sær.

Tað er ikki heilt av tilvild, at lutaíbúðirnar verða beint við eldrasambýlið.

Borgarstjórin sigur, at útsýnið frá húsunum verður framúr.

Lutaíbúðirnar eru ætlaðar tilkomnum og eldri fólki. Húsini verða í einari hædd og væl hóskandi hjá gonguveikum og fólki í koyristóli.

Og ætlanin er eisini, at tey, sum keypa lutaíbúð, skulu kunna brúka ymsar hentleikar á eldrasambýlinum og at vera við ymsum virksemi har.

Eitt nú kann hugsast, at tey kunnu vera við í eini mattænastu hjá sambýlinum og keypa sær máltíðirnar haðani.

Leirvíkar Bygdaráð hevur sett 500.000 krónur av í fíggjarætlanini í ár til ætlanina til projekteringar og aðrar fyrireikingar. Kommunan skal skipa fyri ráðlegging, projektering, útgrevstri og planering. Annars er ætlanin at fara undir byggingina í vár og væntandi verður klárt at flyta inn næsta ár.